## Atli var matchvinnari

Trýst er á Frem, sum herfyri varð dømt at missa stig, tí felagið er í fíggjarligum trupulleikum. Nú er lagið tó betri, eftir at Frem í gjár vann 2-1 á Næstved. Frem kom á odda við sjálvmáli, áðrenn Atli Danielsen økti til 2-0 18 minuttir eftir steðgin. Næstved minkaði seinni um munin, men tað hjálpti teimum tó lítið. - Eftir at vit mistu seks stig, hava vit verið sera uppsettir fyri at vinna okkum upp um niðurflytingarstrikuna aftur, sigur Atli Danielsen.



## Gongur einki hjá Sylla

Eftir eina strúkandi byrjan við fýra málum í sjey dystum fyri nýggja felag sítt, maltesiska Birkirkara FC, hevur Amed Davy Sylla fingið beinini niður á jørðina aftur. Seinnapartin í dag var tað fjórði dysturin upp í slag, har fílabeinsstrandingurin ikki var millum málskjúttarnar. Felag hansara vann greiðan 4-0 sigur á Hamrun, og fyrrverandi B36-framherjin var útskiftur í seinna hálvleiki. Sylla er higartil skrásettur fyri fýra mál í 11 dystum fyri Birkirkara. Fyri B36 leikti hann í alt 64 dystir og skjeyt 34 mál.

# Eingin fekk fyrimun

**Hóast hugsningur var at avgreiða dystin í Gundadali, har B36 skuldi fáa vitjan av Víkingini, so var alt umfarið, sum skuldi spælast í gjár, flutt. Eingin fekk tískil fyrimun í strævnu kappingarætlanini**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*



*Í Gundadali vóru menn farnir at rudda ovara vøll, tá boðini um avlýsing komu. Her er tað Hans Birgir Hansen, sum hevur sett ferð á skovlina*

Veðrið argaði aftur føroysku fótbóltskappingina um vikuskiftið. Júst sum í øðrum umfari av kappingini um løgmanssteypið, legðist nógvur kavi á vøllirnar kring landið, og Kappingarnevndin hjá Fótbóltssambandinum sá ikki aðrar møguleikar enn at flyta alt umfarið.

Einans í Havn, har B36 eftir ætlan skuldi fáa vitjan av Víkingi, var hugsningur um at spæla, men FSF vildi ikki avgreiða dystin.

- Skráin hjá liðunum verður harðari, nú ein dystur skal spælast aftrat. Vit mettu ikki, at tað var rætt, at nøkur lið verða kroyst, meðan hini hvíla. Tí gjørdu vit av at flyta alt umfarið, segði formaðurin í Kappingarnevndini hjá FSF, Sveinur Tróndarson, í útvarpsendsingini hjá Rás2, 3. Hálvleikur, í gjár.

Fólk vóru farin undir at rudda vøllin í Gundadali, tá boðini komu, at eingin dystur skuldi spælast. Ivamál er eisini, um dysturin hevði verið spældur, tí veðrið var sera óstøðugt í høvuðsstaðnum seinnapartin í gjár.

### Ikki spælandi

Longu leygardagin vóru greiðar ábendingar um, at veðurgudarnir eina ferð enn skuldu leggja bein fyri dystum í Formuladeildini. Í næstbestu deildini var ikki spælt, og nógvi kavin var eisini orsøkin til, at fótbóltsáhugaðir føroyingar ikki sóu nakran dyst á føroysku vallunum um vikuskiftið.

- Tað var ikki spælandi. Ivamál vóru um dystirnar á Sandi og í Klaksvík, men fólk á staðnum staðfestu, at tað vóru ikki líkindi og umstøður til fótbólt. Vit hava ein fund í morgin (mánadagin, blðm.), og so fáa vit at síggja. Vit vita einki enn. Tað hevði verið frægast, um dystirnir vóru avgreiddir skjótast gjørligt, men tað kann eg ikki taka støðu til her og nú, segði Sveinur Tróndarsson við útvarpssendingina 3. Hálvleikur.

# Norður til onga nyttu

**Bæði VB/Sumba og TB høvdu lagt leiðina til Havnar leygardagin, men noyddust aftur til Suðuroyar ongul í reyv**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

- Tað tykist mær heldur tilvildarligt, at boðini ikki verða givin nóg skjótt. Og at tað ikki eru nóg greiðar mannagongdir fyri, hvussu boð verða givin og nær tey verða givin.

Soleiðis segði Jón Pauli Olsen, venjari hjá VB/Sumba, har spælararnir høvdu siglt í gott korter, tá teir fingu boð um, at dysturin í Gundadali móti HB kortini ikki varð av nøkrum.

Smyril vendi tó ikki aftur, og tí noyddust spælararnir at sigla til Havnar. Og hóast tað ikki var spælandi, so varð dysturin hjá einum dreingjaliði úr Suðuroynni avgreiddus, soleiðis at hesir ikki eisini noyddust ein eyka túr norður um fjørðin.

- Eg haldi, at tað vildi nógv betri, um greið boð vórðu givin. Tað kundi til dømis verið sagt, at eingin dystur í Gundadali verður spældur hetta vikuskiftið, tí veðrið ikki er til tað, sigur Jón Pauli Olsen, sum eisini heldur, at tað eigur ikki at koma upp á tal, at útsetti dysturin verður settur á skránna eitt kvøld mitt í viku.

Saman við Jón Paula var Jón Johannesen úr TB eisini gestur í 3. hálvleiki á Rás2. Og hann var púrasta samdur í, at slíkir dystir skulu ikki spælast mitt í viku.

- Ítróttarliga er tað nóg krevjandi sum er, tá vit kanska eru við hús klokkan 23 á kvøldi eftir ein dyst norðanfjørðs. Men fíggjarliga er tað eisini trupult, tá spælt verður mitt í viku. Tí veruleikin er jú eisini, at spælararnir kanska missa eina arbeiðsinntøku á 1.000 til 2.000 krónur upp á ein slíkan túr.

TB skuldi spæla oddadyst móti AB. Leingi varð vónað, at tann dysturin kundi avgreiðast, men heldur ikki tað varð av nøkrum.



*Saman við spælarunum hjá VB/Sumba fóru teir hjá TB ein ordans bummtúr leygardagin*

## SMS'a tykkara meining

Í sendingini, 3.hálvleikur, á Rás2 hava lurtarar møguleika at SMS'a sína hugsan um tey viðurskifti, sum verða umrødd í sendingini. Best SMS'ini verða hvønn mánadag at síggja í Sosialinum. Niðanfyri hava vit prentað nøkur av teimum, sum vórðu send inn, tá tosað varð um avlýsingarnar, sum raktu fótbóltin um vikuskiftið.

»Hetta veðrið mugu vit venja okkum við! Tað kunnu vera 4 árstíðir í einum ;D Man skal ik altíð vera for sikkur, at man kann spæla, tí tú veitst aldri, hvussu veðrið verður ;o haha ;D«

»So doyligt, at alt bleiv avlýst. So tapti vit (KÍ) ikki í dag«

»Í 2006 bleiv bara EIN dystur útsettur vegna veður, og tað var JULI (EB/S-ÍF) ;-«

»Kappingin má ikki koppast á, heldur fleiri dystir í bestu árstíðini«

»Høvdu KÍ bara haft Clapson, Atla, Hjalgrim og Rógva. Heilsan KÍ fan«

»Bert ein upplýsing. Kvinnudysturin er eisini avlýstur«

»Eg haldi at kappingarnar skuldu verið sum í dag. Nemliga avlýstar hahaha«